Hvussu eigur kirkjumálið at vera?

Petur Martin Rasmussen

Í bókini um málstríðið[1], sum kom í 1987, havi eg viðgjørt tað partapolitiska stríðið um kirkjumálið og um, hvussu føroyskt mál so við og við vinnur sigur í kirkjuni[2]. Við hesum arbeiðssetningi, sum eg havi hildið meg rættiliga strangt til, var evnið avmarkað. Tí eru týðandi tættir um føroyskt kirkjumál ikki viðgjørdir. Tó hevur í mongum førum verið neyðugt at nerta við teir fyri at fáa viðgjørt tað, sum eg hevði sett mær fyri.

Ein spurningur, sum bert leysliga er umrøddur, er, hvussu teir, sum fóru undir at skriva føroyskt bíbliu- og kirkjumál, hugsaðu sær, at kirkjumálið átti at vera. Tað er henda spurningin, eg skal siga eitt sindur um her. Og eg fari serliga at leggja meg eftir, hvat teir báðir bíbliutýðararnir, Victor Danielsen og Jákup Dahl, søgdu um henda spurning, men eisini aðrar fari eg at nevna.

Tað er ikki serliga nógv tilfar til, men tað gevur okkum eina hampiliga greiða fatan av hugsan teirra um tann málbúna, sum teir ynsktu at lata bíbliutýðingarnar í.

Hjá Victor Danielsen fari eg at halda meg til bíbliutýðingina og hjá J. Dahl harumframt til tað, hann sigur um kirkjumál yvirhøvur.

Um keldutilfarið til hesa grein er at siga, at alt tað, her verður nevnt um J.H. Schrøter, havi eg frá endurútgávuni hjá Chr. Matras av Matteustýðing Schrøters[3]. Tað, sum endurgivið verður eftir Victor Danielsen, er alt tikið úr eini ritgerð hjá Jógvani á Lakjuni[4]. Sjónarmiðini hjá J. Dahl kenna vit frá óprentaðu endurminningum hansara[5] og frá offisiellum skrivum í sambandi við stríðið um kirkjumálið[6]. Okkurt annað tilfar verður eisini brúkt, sum verður nevnt so við og við. Eg havi ikki brúkt bløðini. Tey hava ikki týdning í hesum viðfangi, av tí at tað, sum har kemur fram, fyri tað mesta ikki er bygt á grundgivin sjónarmið. Fyri málgranskarar hava sjálvsagt teir bíblisku og kirkjusøguligu tekstirnir størsta týdning. Okkurt fari eg at taka upp aftur úr bókini um málstríðið.

Eg fari at byrja við Schrøter, sum týðir 100 ár undan Victor Danielsen og Jákupi Dahl.

Í 1823 kom út týðing J.H. Schrøters av Matteusevangeliinum. Hann fór undir bíbliutýðing, tí at hann í prestyrki sínum stundum hevði brúkt føroyskt og hevði tá verið varur við, at fólk skilti betur føroyskt enn danskt. Eftir nútíðarmáti er týðingin hjá Schrøter kanska ikki serliga gott og reint føroyskt mál. Sjálvur sigur Schrøter, at hann við vilja hevði brúkt eitt sindur eldri mál,

Fróðskaparrit 36.-37. bók (1988-89): 81-92

enn vanligt var í føroyskum talumáli tá, sum hann sigur var so nógv blandað við hálvdanskt, at tað var hvørki danskt ella føroyskt. Hetta var jú ein av atfinningunum at Schrøter, at hann hevði brúkt orð, sum fólk flest ikki skiltu longur.

Táverandi viðareiðisprestur, Sørin Sørensen, setti fólk at lesa úr týðingini hjá Schrøter og sigur, at summi av teimum hildu, at føroyskt mál – ella kanska serliga einstøk føroysk orð – var ikki nóg hátíðarligt sum bíbliumál. Hetta er sjálvsagt tí, at fólk eru ikki von við føroyskt.

V.U. Hammershaimbs dómur yvir Schrøters týðing er ógvuliga harður. Og tó at hann sigur tað sama sum Sørensen – uttan at brúka somu orð – meinar hann tað øvugta. Schrøter hevur drigið tað heilaga orðið niður í „den laveste sfære i deres røgstuer", soleiðis tekur hann til[7]. Tað vil siga, at Hammershaimb heldur, at málbúnin er ov gerandisligur, t.e. ov lítið hátíðarligur. Hjá Hammershaimb er tað ikki sum hjá Sørensen, at føroyskt mál í sær sjálvum ikki er nóg hátíðarligt, men tað er tann føroyski málbúnin hjá Schrøter, sum ikki er nóg góður og reinur.

Vit hava longu her í sambandi við týðingina hjá Schrøter tvey sjónarmið, sum ganga aftur og aftur: 1. at bíbliumálið og kirkjumálið skal liggja so nær tí danskt ávirkaða talumálinum, sum til ber, og 2. at tann danski arvurin skal lúkast burtur úr málinum, og tað skal vera so reint føroyskt sum gjørligt, og tá má sjálvsagt gerast, sum Schrøter gjørdi: at leita fram orð og máltilfar úr gomlum føroyskum máli og fáa tað aftur til brúks.

Tað, sum altíð ger orðaskiftið um málspurningin, ikki bert um kirkjumálið, ósakligt, er, at í somu løtu sum hetta seinna sjónarmiðið verður gjørt galdandi, stingur seg upp skuldsetingin, at tað er íslendskt. Men hinvegin verður ongantíð funnist at donskum-føroyskum brongli.

J.P. Gregoriussen umsetti nakrar bíbliskar tekstir, partvíst hevur hann gjørt tað saman við Hammershaimb[8]. Stutt eftir, at spurningurin um føroyskt sum kirkjumál var komin á tingborð, segði ein sambandsmaður á tingi – J.J. Dahl – at hann hevði einki ímóti, at føroyskt varð brúkt í kirkjuni, men skuldi tað vera „hammershaimbskt", vildi hann heldur hava danskt[9]. Týðingin hjá Schrøter er í hvussu so er ikki „hammershaimbsk", t.e. hevur ikki sama dám, sum málið hjá Hammershaimb. Men tað hava týðingarnar hjá J.P.G. Tað sama má sigast um bíbliusøguna hjá Jógvani Poulsen[10] og týðingina av Jóannesar evangeliinum hjá A.C. Evensen[11].

Í kjakinum um bibliu- og kirkjumál verður nógv sagt til verju fyri tað danskt ávirkaða málið. Men tann einasti, sum hevur týtt á henda hátt, er Victor Danielsen – tað er týðing hansara av Nýggja Testamenti (NT), sum kom í 1937. Nú er semja um, at málið í týðingini er vánaligt, og stórur munur er millum hesa týðing og týðingina av Gamla Testamenti (GT) og nýggju týðingina av NT í 1949 og eisini týðingina av NT hjá Jákupi Dahl, sum kom í heftum frá 1923. Tað má kallast ein nýggj týðing, sum Victor Danielsen kom við í 1949. Týðingin av Jóannesar evangeliinum hjá Dahl er gjørd um sama mundið sum Victors týðing, og somuleiðis kom lestrabókin *Í lýsing* hjá Dahl út tað árið, Victor Danielsenbyrjaði at týða. Og tað má sannast, at stórur munur er millum málbúnan í hesum verkum. Tað er sjálvsagt ikki rætt at meta málið við nútíðar alin, men sum her víst á er tað eisini vánaligt mál sammett

við samtíðar mál í átrúnaðarligum bókmentum. Og Victor Danielsen var sum frá leið ikki sjálvur nøgdur við tað.

Hví umsetti Victor Danielsen, sum hann gjørdi? Tað, eg veit, hevur hann ikki greitt frá hesum um somu tíð, sum umsetingin var gjørd. Ikki fyrr enn eini 15 ár seinni, og í sambandi við tað stríð, sum tók seg upp, eftir at bæði GT og NT vóru komin út í 1949, tá ið málbúnin í týðingini av NT var so nógv broyttur, at vit veruliga kunnu nevna tað eina nýggja týðing, sigur hann nakað um, hvør grundin var til málbúnan í 1937. Hann sigur tá, at grundin var ikki tann, at hann ikki dugdi „at skriva føroyskt tá sum nú". Men hann helt, at „mangan tann størri parturin av teimum, ið lesa skuldu, nógv fyrr vildu hava tað málið, sum eg tá nýtti", og hann heldur fram: „eg skrivaði, fyri at bókin kundi vera til uppbyggingar, og ikki fyri at demonstrera, at eg dugdi at skriva føroyskt"[12]. Tann seinasti setningurin er týðiliga merktur av stríðsstøðuni, hann stóð í eftir 1949.

Tá ið Victor Danielsen var deyður – í 1961 – skrivar Petur Háberg, at málmenn, sum fýltust á týðingina hjá Victori, vistu ikki, hví hann „hevði valt sær eitt málsnið, sum lá so nær at talumálinum." Petur Háberg heldur fram, at Victor Danielsen týddi ikki bert til teir „kønu", men hann „vildi geva fólkinum eina týðing, sum tað kundi taka til hjarta og nýta". Og –í triðja lagi – sigur Petur Háberg, at Victor Danielsen vildi lata 1937-týðingina við sínum serliga málsliga búna „vera tann lagarstein, ið skuldi vera fólksins millumstig til eitt treyst og ramligt føroyskt bíbliumál."

Hvussu skulu vit meta hesar báðar grundgevingarnar fyri, at Victor Danielsen hevði valt tann málsliga búnan, sum hann gjørdi í 1937-týðingini? Báðar eru vorðnar til nógv ár seinni enn týðingin, ávikavist 15 og 25 ár eftir, at týðingin er komin. Og báðar eru vorðnar til í serligum umstøðum. Tann hjá Victor Danielsen í eini stríðstøðu og tann hjá Peturi Háberg, tá ið týðarin var deyður. Vit mugu tí spyrja, um tað, sum sagt verður so nógv ár seinni, veruliga er tað, sum lá aftanfyri, tá ið týðingin var gjørd. Tað er ikki óvanligt í slíkari skriving seinni at finna onkra grund til tað, sum gjørt er frammanundan, og sum ein ikki er nøgdur við. Líka so vanligt er tað, at onkur annar roynir at finna eina skilagóða grund til, at meistarin gjørdi, sum hann gjørdi, og sum hvørki meistarin sjálvur seinni ella tann, sum skrivar, heldur vera serliga gott. Tað er vert at kanna eftir, um tað, sum Victor Danielsen sjálvur og Petur Háberg siga, er merkt av tí, sum eg her havi nevnt.

At Victor Danielsen, sum hann sjálvur sigur, og Petur Háberg tekur upp aftur, hevur dugað at skrivað eitt betri og reinari føroyskt mál enn tað, hann hevur nýtt í týðingini í 1937, tykir mær ongan iva vera um. Tað prógvar alt annað, sum hann hevur skrivað, eisini tann nýggja týðingin frá 1949.

Tá ið Victor Danielsen sigur um málið í 1937-týðingini, at fólk flest „nógv fyrr" vildu hava tað málið, og tí brúkti hann tað, „fyri at" NT kundi vera til uppbyggingar, mugu vit spyrja: hvat sipar „nógv fyrr" til? Petur Háberg tekur eisini hetta upp aftur við øðrum orðum: Victor vildi geva fólkinum – við striku undir fólkinum – eina týðing, sum tað kundi taka til hjarta. Victor sigur her ikki meira enn hálvan setningin. Hann sigur ikki: nógv fyrr enn hvat mál. Og tað er tann spurningin, vit mugu royna at finna eitt rímiligt svar uppá. Tað svarið, sum eg haldi vera trúligast, er hetta: Jákup Dahl hevði verið lærari hjá Victori í føroyskum á lær-

araskúlanum, hann var fegin um næming sín og næmingurin um lærara sín. Ongantíð, tað eg veit, var stríð millum Dahl og Victor Danielsen. Tá ið Victor Danielsen skrivaði hetta, var Dahl deyður. Alt hetta kann hava gjørt, at Victor – í virðing fyri sínum gamla lærara – ikki hevur lagt í at sagt meira, enn hann gjørdi. Men mær tykir, at lítil ivi man vera um, at tað er týðingina hjá Jákupi Dahl, hann hevur í huganum. Dahl var longu um at vera liðugur at týða NT, tá ið Victor Danielsen fór undir at týða. Og tá ið Victor Danielsen fór undir at týða NT, nú ein týðing longu var til, má hann hava hildið, at neyðugt var við eini nýggjari. Og grundin hertil kann illa vera onnur enn tann, at hann hevur mett málbúnan hjá Dahl at hava verið ov tungan. Orðalagið, at hann týddi, fyri at NT skuldi vera til uppbyggingar, kann í hesum viðfangi ikki merkja annað, enn at fólk yvirhøvur skuldu skilja hana málsliga. „Nógv fyrr" merkir tí: at fólk flest, eftir Victors hugsan, nógv fyrr vildu lesa tað málið, hann týddi til, enn málið í týðingini hjá Dahl. Um Victor Danielsen so hevur rætt í hesum, er ein annar spurningur, sum vit ikki skulu viðgera í hesum viðfangi, tí her er høvuðssakin, hvør uppfatan liggur aftan fyri málbúnan hjá Victori í 1937.

Mær tykir ikki, at tað, sum Victor skrivar í 1952, er ein eftirrationalisering, t.e. ein roynd at fjala, hví hann umsetti, sum hann gjørdi, í 1937. Men soleiðis sum hann skrivar í 1952, hevur hann veruliga hugsað, tá ið hann fór í holt við týðingina. Tá ið NT skuldi koma út aftur, gav Victor tí ein heilt nýggjan málbúna, við øðrum orðum, tá hevði hann slept sínum gamla týðingarprinsippi, men kávar ikki útyvir, at hann hevði aðra hugsan um málið í bíbliutýðing í 1937, enn tá ið hann gjørdi 1949-týðingina.

Harímóti er tað neyvan rætt, tá ið Petur Háberg vil vera við, at 1937-týðingin skuldi vera „fólksins millumstig til eitt treyst og ramligt føroyskt bíbliumál". Hetta er ov upplagt ein umbering fyri, at Victor gav týðingini tann málbúna, sum hann gjørdi. Hjá Victori sjálvum finst einki, sum mær er kunnugt, ið bendir á, at Victor hevur havt nakra ætlan um fyrst at gera eina týðing í einum málbúna fyri seinni at geva týðingini ein nýggjan búna.

Samanumtikið kann tí sigast, at Victor Danielsen helt, at týðingin hjá Jákupi Dahl var ov tung, tí gjørdi hann eina lættari. Sum frá leið var hann ikki nøgdur við málið í síni egnu týðing og broytti tað tí radikalt – yvir móti málinum hjá Dahl. Tað er tað, hann sjálvur sigur í 1952. Málsliga er munurin millum týðingarnar nú ikki serliga stórur, tó at orðavalið í støðum er nakað ymist. Ein samanbering við upprunatekstin avdúkar skjótt, at Dahl hevur umsett eftir grikska tekstinum, meðan tað stundum kann síggjast, hvørjum europeiskum týðingum Victor Danielsen umsetir eftir.

Við síni hugsjón at gera eina „lætta" týðing hevur Victor Danielsen gjørt tað, sum er gjørt fleiri ferðir tríati ár seinni, frá 1960-árunum, við t.d. The New English Bible og tí amerikonsku Good News for Modern Man, og seinni í øllum norðurlondum. Spell var, at Victor Danielsen slepti hesum tankanum og nærkaði sína týðing so nær Dahls, at lítil grund er til at hava tvær týðingar.

Eg havi gjørt so nógv burtur úr týðingini hjá Victori, tí at hann er tann einasti, sum hevur gjørt eina roynd at týða, sum hann gjørdi. At hann so slepti ætlanini, er ein onnur søga. Og tí at hann hevði eina positiva ætlan við sínum týðingarhátti: at týðingin skuldi vera til uppbyggingar, ið er sama

grundin, sum J.H. Schrøter hevði til at týða til føroyskt. Og so í triðja lagi fyri at seta Victors hugsjón upp móti øðrum, sum vildu hava eitt bíbliu- og kirkjumál í einum líknandi búna sum Victor, men av heilt øðrum – og negativum – grundum: lutvíst av illvilja ímóti, at føroyskt yvirhøvur skuldi vera kirkjumál, og skuldi tað endiliga vera tað, so skuldi málið ikki vera tað, sum hesi fólk skuldsettu fyri at vera íslendskt, men heldur leggjast upp at donskum.

Umboðsmenn fyri hesa hugsan havi eg viðgjørt í sambandi við tað politiska stríðið um málið og skal tí gera stutt av í hesum viðfangi.

Gulak Jacobsen[13] fór ikki at prædika á føroyskum fyrr enn mitt í tríatiárunum. Hjá honum var tað ein kúvending. Fyrra partin av 1920-árunum var hann hart ímóti, at føroyskt skuldi gerast kirkjumál. Hann fór ógvuliga harðliga fram móti ritualtýðingini hjá Jákupi Dahl, og tað var ikki bert, tí at hann ikki vildi hava føroyskt inn í kirkjuna, men tí at hon málsliga eftir hansara tykki var ov nógv ávirkað av íslendskum. Í staðin átt Dahl at hava tikið upp eftir norskum-donskum ritualmáli. Seinni broytti hann støðu og rósti verkinum hjá Dahl. Hann er eisini sjálvur upprunaliga Hammershaimbsmaður í studentadøgunum í Keypmannahavn í nítiárunum. Men tíðliga hevur hann skift kós. Hammershaimb vendi sær stutt fyri aldaskiftið móti „ultrafærøismen", og helst man Gulakur eins og aðrir hava fylgt hesum skifti. Nøkur ár seinni var Hammershaimb meira vælsinnaður fyri føroyskum kirkjumáli. Men tá gjørdist málspurningurin politiskur, og tað kann eisini hava hildið Gulaki Jacobsen aftur. Persónligu viðurskiftini millum Gulak Jacobsen og J. Dahl eftir 1918 hava ikki gjørt tað betri. Gulak Jacobsen hevur sjálvur skrivað „hammershaimbskt", sum tað sæst av tí sindrinum, hann hevur skrivað. Hetta merkir, at tá ið hann skuldi siga sína hugsan um, hvussu kirkjumálið átti at vera, hevur nógv annað flotið upp við borðinum enn hesin spurningur. Niðurstøðan má vera tann, at sjálvt um Gulak Jacobsen í orrustuni fyrst í 1920-árunum sigur seg vilja hava eitt norskt-danskt ávirkað kirkjumál, so er veruliga sannføring hansara, at málið eigur at vera „hammershaimbskt".

Th. Sørensen próstur[14] var hart ímóti føroyskum kirkjumáli, og eingin endi var á teimum vanlukkum, hann væntaði, um so varð. Hann minnir mest um Emil Bruun[15], sum var prestur í Føroyum tey fyrstu árini av tjóðskapartíðini. Sørensen helt, at skuldi føroyskt vera kirkjumál, skuldi tað vera eitt føroyskt mál, so sum málið er í veruleikanum, sum hann tekur til. Tað, hann meinar, er, at tað dagliga talumálið skal vera bíbliu- og kirkjumál, og hann skjýtur tí upp at broyta ritualini hjá Dahl samsvarandi. Broytingaruppskotini hjá Sørensen minna um málið í 1937-tíðingini hjá Victori Danielsen. Seinni broytti Sørensen – eins og Gulak Jacobsen – lutvíst støðu, men ikki fyrr enn Hjalmar Hammershaimb var komin upp í ritualsakina.

Olivur Effersøe er ongum líkur uttan sær sjálvum. Hann hevur sum so mangur annar eitt Íslands-kompleks. Bert eitt hálvdanskt orð, sum hevur verið brúkt í føroyskum talumáli, er skift um við eitt eldri føroyskt orð, sum eisini er til í íslendskum, skal tað vera íslendskt. Men harafturat sýnir hann tann ódámliga atburð, sum eingin annar ger, at hann sum ríkisdagsmaður gongur aftan fyri bakið á teimum, sum høvdu við málið at gera. Hann trínur ikki fram alment og sigur sína hugsan, men skrivar brøv til kirkju-

málaráðharran, sum J. Dahl og onnur, sum høvdu við sakina at gera, ongantíð fingu at síggja, men í besta lagi fingu at hoyra um í kirkjumálaráðnum. Effersøe sigur ikki nakað um sína hugsan, men skjýtur seg undir Sørensen prást, Hjalmar Hammershaimb og Chr. Bærentsen amtmann og aðrar. Her skulu bert endurgevast partar úr einum brævi frá Olivuri Effersøe landstingsmanni til kirkjumálaráðharran[16]. Vit mugu minnast til, at tá vóru fimm ár, síðan ritualini vóru týdd, og tey høvdu ferðast aftur og fram til ummælis. Effersøe sigur, at stríðsspurningurin um ritualtýðingina snýr seg um, um tey skulu umsetast til íslendskt ella til eitt mál, sum tað núlivandi ættarliðið í Føroyum skilir. Fyri Effersøe er hetta tað sama sum spurningurin um málsliga nýskapan ella kirkjuligt atlit. Hetta eru hansara egnu orð. So krýpur hann sær undir kjólafaldin hjá Sørensen prósti og leggur hann undir at hava sagt, at ritualtýðingin hjá Dahl orð fyri orð er einsljóðandi við „viðkomandi stød" í íslendsku bíbliuni. Í skjølum frá Sørensen finst hann ikki at hava málborið seg soleiðis, sjálvt um hann heldur, at týðingin hjá Dahl er ov nógv íslendskt ávirkað. Lítið trúligt er tað, at Sørensen hevur lýtt Effersøe hetta í oyrað, tí nakað óreiðiligt menniskja var Sørensen á ongan hátt.

So tekur Effersøe sjálvur til orða aftur og gevur nevndarlimunum, sum skuldu viðgera ritualtýðingina, ummæli, og sjálvt um tað er endurgivið fyrr, skal tað takast upp aftur. Tað ljóðar: 1) provst Dahl, en Fanatiker paa det sproglige og nationale Omraade, 2) Kongsbonde Johs. Patursson, ds. – tað má merkja: tað sama sum Dahl. Ligeledes vel kendt fra Norgessagen i Fjor, Selvstyrepartiets Formand. Kommissionens eneste rent læge medlem. Tað kann ikki merkja annað í hesum viðfangi, enn at hann hevur einki skil fyri føroyskum máli. 3) Lærer Kallsoy, Ejde, Selvstyrepartiets Kandidat ved sidste Lagtingsvalg paa Østerø. 4) Lærerinde Karen Samuelsen, Hvidenæs, Johs. Paturssons Slægtning. 5) Højskoleforstander Símun af Skarði. Som Nr. 1). Danmarks farligste Modstander paa Færøerne. A. Sognepræst Gulak Jacobsens sproglige Evner er uomtvistelige. Forøvrigt er han en udpræget Fredens og Kristendommens Mand, for hvem jeg nærer den største Agtelse. Maa anses for at staa uden for de politiske Partier. B. Lærer Joen Poulsen. Som A, dog at han er Medlem af Sambandspartiet. Effersøe sigur, at tað, sum hann her hevur skrivað, ynskir hann at bera fram fyri kirkjumálaráðið og almenningin. Og so krevur hann at fáa svar frá ministeriinum upp á fýra spurningar, harav eg skal nevna tann seinasta, sum er, um ministeriið kennir samanhangin millum Dahls ritualstýðing og íslendskt mál, og hann endar ógvuliga flott við hesum orðum: Offentligheden og jeg er nemlig stærkt interesseret i at kende Sagens Gang i sin Helhed.

Effersøe nevnir her Jógvan Poulsen sum sín partamann í málspurninginum. Men tað var Jógvan Poulsen ikki, tá ið spurningurin var um málbúnan. Jógvan Poulsen gav sjálvur út eina bíbliusøgu í 1900, og í hesum arbeiðinum hevur hann ráðført seg við Hammershaimb, og mær tykir, at hon er skrivað á einum frálíkum máli, sum vit mugu siga er føroyskt og hvørki danskt ella íslendskt. Tað hevði ikki verið órímiligt hjá Effersøe at skuldsett Jógvan Poulsen fyri at týða til íslendskt, tá ið hann kann skuldseta Dahl fyri tað. Men hann hevur kanska ikki lisið bíbliusøguna. Jógvan Poulsen var alt lívið eymur um málið, og so seint sum árið

fyri, hann fór úr løgtinginum, kemur hetta fram í einum brævi[17] til Jákup Dahl, og tað er ongantíð nøkur illneiting frá hansara síðu móti málbúnanum hjá Dahl.

Heldur ikki Fríðrikur Petersen vildi góðtaka eitt nógv danskt ávirkað mál. Og einaferð beyð hann sær til at bøta um málbúnan í nøkrum sálmum, sum søkt var um at syngja til eina gudstænastu[18]. Hann var ikki nøgdur við tann føroyska málbúnan, men tíverri havi eg ikki funnið viðmerkingar hansara og veit tí ikki, hvat hann hevði at finnast at. Og hvussu vandin Fríðrikur var málsliga, kunnu vit sannføra okkum við at lesa yrkingar hansara.

Victor Danielsen setti sína týðing upp móti Dahls av málsligum grundum. Vit skulu nú kanna eftir, hvørjar hugsanir lógu aftanfyri, at Jákup Dahl týddi, sum hann gjørdi.

Einki er funnið um týðingarhátt ella prinsipp í tilfarinum hjá Dahl, meðan hann umsetti, men sjálvsagt hevur hann eins og ein og hvør annar, sum ger slíkt arbeiði, gjørt sær sínar tankar, soleiðis sum eg havi greitt frá, at Victor Danielsen hevur gjørt.

Í 1942, bert tvey ár áðrenn hann doyði, skrivaði hann sínar endurminningar viðvíkjandi kirkjumálinum. Dahl hevur ikki latið hetta prenta og heldur ikki ætlað, at tað skuldi prentast í tí líki, tað var skrivað. Endamálið er at savna og skriva niður upplýsingar, sum ikki eru at finna í teimum skjølum, sum hoyra til tey ymisku málini.

Tað, sum Dahl sigur um málið, serliga um orðatilfarið, er í sambandi við umtalu hansara av mótuppskotinum hjá Sørensen prósti til ritualtýðingina hjá Dahl, sum eg havi nevnt frammanundan, og eisini at Sørensen vildi hava, at kirkjumálið skuldi vera tað sama sum talumálið.

Dahl skrivar um „at nýta forn orð og at gera nýggj orð“[19], og tað ríkar mál okkara. Um orðasmíð sigur hann: vit kunnu og vit skulu evna nýggj orð „eftir málsins egnu lógum“ „burtur úr tí tilfari, vit hava frammanundan í málinum“. Um at brúka forn orð tekur hann soleiðis til: „at vit ikki skulu vera bangnir fyri at taka orð úr kvæðunum; tí at kvæðini eru livandi mál enn dagin í dag, við at tey vera jú kvøðin á hvønns manns munni“. Í hesum viðfangi kann eg nevna, at Heðin Brú segði um týðingina hjá Viderø av GT, at hann válkaði sær í kvæðamálinum. Hvat so um hetta seinasta, sum Dahl sigur um kvæðini, at tey eru á hvønns manns munni, er og ikki, so er tað greitt, at Dahl í sínum týðingum bæði ger nýggj orð og finnur gomul orð fram úr gloymskuni, í staðin fyri at velja tann møguleika, sum hann eisini nevnir, at taka orð úr øðrum málum og geva teimum eitt „so dánað føroyskt snið“. Dahl nevnir ikki her, hvat mál hann hevur í huganum. Tað var heldur ikki neyðugt. Tað er øðrumegin danskt-norskt, sum fleiri vildu hava sum støði undir føroyskum kirkjumáli. Hinumegin er tað íslendskt, sum Dahl og onnur, sum hildu seg til hammershaimbska málarvin, vóru skuldsettir fyri at skriva.

Eins og Victor Danielsen hevur Dahl ikki skrivað hetta fyrr enn fleiri ár eftir, at hann var liðugur at týða NT – tó skal sigast, at hann týddi úr GT næstan so leingi, hann livdi. Vit mugu tí eisini í hesum føri spyrja, um tað var hetta sjónarmið, sum Dahl týddi eftir, ella hann sær hetta sum eitt ideal, eftir at hann er liðugur við NT.

Her eru vit so heppin, at vit hava eitt svar, um ikki frá Dahl sjálvum, so frá Gudmundi Bruun so tíðliga sum í 1919, t.e. áðrenn Dahl av álvara fór undir týðingararbeiði sítt við útgávu av samanhangandi skriftum í NT fyri eyga, men kortini hevði hann longu tá, í

1912, týtt allar prædikutekstirnar, sum hann og Símun av Skarði royndu at fáa viðurkendar til kirkjubrúks saman við eini sálmabók. Søguna um hetta mál havi eg viðgjørt gjølla[20]. Gudmundur Bruun hevði í 1919 havt føroyskar gudstænastur í Keypmannahavn í eini 3-4 ár, og hann hevði verið í Føroyum u.l. eitt hálvt ár í 1916-17, og vit vita, at Dahl og hann hava talað saman um málspurningin. Tað kann tí eingin ivi vera um, at Gudmundur hevur kent týðingina hjá Dahl av prædikutekstunum, og nú hevði hann so fingið ritualtýðingina til ummælis. Og so kemur harafturat, at Gudmundur sjálvur hevði týtt tað, sum neyðugt var til gudstænastubrúks til sínar egnu gudstænastu í Keypmannahavn og hevði týtt øðrvísi enn Dahl og var í ein vissan mun ósamdur við Dahl. Hann talar honum tí ikki eftir munninum.

Um orðavalið sum heild í ritualtýðingini hjá Dahl sigur Gudmundur, at tað er framúr gott – „fortrinligt", og um málburðin yvirhøvur, at hann er ektaður føroyskur – „gennemført, ægte færøsk Sprogtone".

Tað, sum hevur serligan týdning í okkara viðfangi, er tað, sum Gudmundur[21] sigur um, hvussu roynt hevur verið at skapa eitt føroyskt kirkjumál. Teir flestu, sum higartil hava fingist við hetta, hava leitað fram gomul orð og málburð, sum ikki longur verður havt á munni, ella lænt orð úr íslendskum og vesturnorskum landsmáli. Hann sigur ikki, hvørjar hann sipar til við „teimum flestu", men uttan iva telur hann seg sjálvan teirra millum – tað hevur ikki verið gjørligt at fáa at vita, um nakað er til longur av tí, sum Gudmundur týddi.

Jákup Dahl harímóti, sigur Gudmundur, hevur við hepnari hond í fleiri førum leitað ein annan veg. Og tað er, at Dahl hevur gjørt nýggj orð burtur úr orðum, sum øll kenna. Gudmundur nevnir einki dømi. Men Dahl nevnir í endurminningunum eitt orð av hesum slagnum. Tað var ein maður, sum spurdi hann, um hann ikki heldur enn *kærleiki* kundi siga *kerligheit,* tí tað var „heitari". Orðið kerligheit við tí týsku-donsku endingini kendu øll. Tað, sum Dahl ger, er at koyra tað fremmandu endingina burtur og seta eina føroyska ending í staðin. Hetta er júst ikki at geva orðinum – sum Dahl kallar tað – eitt so „dánað føroyskt snið", sum er at gera donsku endingina *-hed* til *-heit* á føroyskum, men at geva eini felags norðurlendskari rót eina føroyska ending í staðin fyri eina danska. Gudmundur hevur rætt í, at tað eru eingir trupulleikar at skilja slík orð, og at tey eisini festa seg í málinum. Tað vóru heldur ikki trupulleikar at skilja hjá manninum, Dahl nevndi, hann helt bert, at orðið ella formurin, hann var vanur við, var flógvari.

Gudmundur sigur ikki, at Dahl als ikki hevur funnið forn orð úr gloymskuni ella lænt orð úr øðrum málum.

Um dámin í málinum sum heild í ritualinum sigur Gudmundur, at tað er ein „Blanding av Jævnhed og Højtid... med stor kirkelig Takt og Forstaaelse."

Bæði Gudmundur Bruun, Gulakur Jacobsen og Símun av Skarði leggja dent á, at málið, serliga í ritualinum, eigur at hava ein hátíðarligan dám, meira hátíðarligan enn í „den person- og tidsbestemte" prædikuni, sum Gulakur tekur til.

Eg skal nevna eitt afturat frá Gudmundi. Honum dámar ikki teir gomlu sagnorðaformarnar, t.e. *vær biðjum* o.s.fr., í bønum, tí at hann heldur, at tað inniliga í bønini verður veikari av slíkum formum, harímóti heldur hann teir vera væl egnaðar eitt nú í skrift-

sitatum í ritualunum. Í bíbliutýðing kundu vit kanska hugsað okkum hetta sjónarmið flutt yvir á sitat úr GT í NT.

Victor Danielsen vildi týða NT soleiðis, at tað kundi vera til uppbyggingar, og tað merkir í samanhanginum, at øll skuldu skilja málið. Eg haví ikki nevnt eitt tilsvarandi sjónarmið hjá Dahls monnum, um eg kann nevna teir so. Men hetta er sjálvsagt heldur ikki fremmant fyri teimum. Tað kemur serliga fram í viðmerkingum frá Dahl í 1923 til broytingaruppskotini frá Sørensen prósti til ritualtýðingina. Her sæst eisini, hvussu opin Dahl hevur verið fyri atfinningum, tá ið grund var undir teimum, og harafturat fáa vit í hesum skrivi at vita, hvussu Dahl kundi taka við øllum góðum orðum og málburði, hvar hann kundi finna slíkt. Eg skal pilka okkurt burturúr.

Dahl umsetti upprunaliga avnoktanina í trúarorðunum soleiðis: Vit avnokta djevulin og allar gerningar hans og „alt skap hans". Sørensen próstur skeyt upp at broyta alt skap hansara til „alt, ið hans er". Í viðmerkingunum heldur Dahl, at tað besta uppskotið er tað hjá Gulaki, sum hevði skotið upp at siga „allan atburð hans". Og soleiðis varð tað. Dahl hevði formin „kalikur", Sørensen vildi heldur hava „kalkur". Dahl leggur fram tvær grundir til at halda fast við formin kalikur: 1. eingin sigur annað, og 2. Jógvan Poulsen brúkar kalikur í bíbliusøguni, og hon hevur í áravís verið brúkt bæði í skúlunum og heima við hús.

Dahl byggir sostatt á 1. tað, sum er gott mál og góð føroysk orð, 2. tað, sum kent er í eldri kirkjuligum bókum, og 3. tað, sum øll siga og skilja.

Sjónarmiðini aftan fyri týðingarvirksemið hjá Dahl er sostatt meira nuanserað enn hjá Victori Danielsen. Hjá Victori var bert eitt: tað skuldi vera lætt at lesa og skilja, so mátti alt annað víkja. Victor gekk sjálvur nøkur ár seinni burtur frá hesum sjónarmiði. Hann týddi GT á sama hátt sum NT í 1937, men tað varð ongantíð prentað. Hann skal hava sagt, at hann var ikki keddur av tí og týddi tað umaftur eins og NT. Tað er útgávan frá 1949. Hetta er tað triðja sjónarmiðið, sum eg nevndi hjá Dahl – men raðfylgjan er tilvildarlig.

Tað næsta sjónarmiðið hjá Dahl var tað tilfar, hann fann í eldri kirkjuligum og bíbliskum máltilfari. Skúlaður í gudfrøði, sum hevur aldagamlar røtur, og sum fólkakirkjuprestur við líka so gomlum rótum er tað natúrligt hjá Dahl umframt at hyggja uttan um seg at líta aftur um bak. Victor Danielsen hevði harímóti sum fríkirkjumaður í eini nýggjari rørslu kvett sambandið aftureftir og vent sær móti allari tradisjón, men vendir í vissan mun aftur til hennara seinni í lívinum.

Viðvíkjandi tí fyrsta sjónarmiðinum hjá Dahl, at málið skuldi vera gott føroyskt, er at siga, at Dahl so at siga er vaksin upp við tjóðskaparrørsluni, kom blaðungur til Havnar í nítiárunum stutt eftir at tjóðskaparrørslan, sum hevði til høvuðsendamáls at fáa móðurmálið aftur til heiður og æru, hevði tikið seg upp, og framvegis ungur kom hann upp í tað politiska stríðið, sum fyri stóran part snúði seg um málið. Og kirkjumálið mátti, júst tí at kirkjan var statsstuðlað fólkakirkja, gerast ein partur av tí politiska stríðnum. Og bæði tað tjóðskaparliga og politiska stríðið miðaði ímóti at fáa loyvi til at brúka móðurmálið og í so stóran mun, sum forsvarligt var, at fáa tað sett í staðin fyri danskt og ikki minst eitt danskbronglað føroyskt. Tað er tí natúrligt, at málbúnin lá frammarlaga í huganum á hesum stríðs-

monnum. Victor Danielsen kundi sum umboð fyri fríkirkju, sum einki tilknýti hevði til myndugleikarnar, virka ótarnaður av lógum og fyriskipanum, og hansara virksemi var tí ongantíð drigið inn í tað politiska stríðið um málið. Hann kendi tí heldur ikki sviðan av tí mangan beisku politisku móstøðuni móti móðurmálinum á sama hátt sum Dahl og A.C. Evensen. Tað er eisini grundin til, at Victor ikki hoyrir við í eini viðgerð av tí politiska stríðnum um móðurmálið. Hann hevði tí heldur ongar politiskar mótstøðumenn, sum hann skuldi vísa og standa til svars fyri, at føroyskt bíbliumál kundi vera eins gott og vakurt og øll onnur mál.

At enda kunnu vit spyrja, hvussu tað ber til, at týðingin hjá Dahl serliga av brøvunum í NT kennist heldur tung. Svarið er upplagt: Dahl heldur seg so nær til tann upprunaliga grikska málbygningin sum gjørligt, so at vit viðhvørt næstan kunnu siga, at Dahl bert hevur umsett orðini og ikki setningsbygningin við tí úrsliti, at orðini eru føroysk, men orðalagingin er griksk. Hetta er ikki sereyðkenni fyri Dahl, men soleiðis hevði allastaðni í Europa verið umsett síðan ortodoksa tíðarskeiðið í 17. øld. Tankin hjá Victori Danielsen at gera eina lættfatiliga týðing hevur neyvan verið tann sami sum nú,ið alt skal tyggjast fyri fólk og glíða niður við ongum ómaki. Heldur hevur tankin verið tann sami sum hjá trúbótartýðarunum, at fólk, sum dugdu at lesa, eisini skuldu kunna lesa Halgubók. Soleiðis týddi Luther, og eftir hann í Norðurlondum komu í Danmark Christian den IIIs bibel, í Svøríki Gustav Vasa Bibeln og í Íslandi Guðbrandsbiblía. Hjá teimum ortodoksu bíbliutýðarunum var hugsanin, at tað mest umráðandi var, at bíbliuteksturin lá so nær upp at upprunanum, sum til bar. At kristin fólk áttu at kunna lesa Halgubók á móðurmálinum, var endamálið hjá báðum teimum føroysku týðarunum.

Samanumtikið kann sigast, at vit hava tvey høvuðssjónarmið málinum viðvíkjandi: 1. eitt danskt ávirkað mál, ið lá táverandi talumálinum so nær, sum til bar, og 2. eitt mál, har tað danska árinið var lúkað burtur í so stóran mun sum møguligt, so at tað var eitt reinari føroyskt mál. Ein stórur partur av teimum, sum vildu varðveita tað danskt ávirkaða málið, vóru fólk, sum ikki skrivaðu á føroyskum. Størsti parturin av teimum, sum skrivaðu, vóru hygnir um móðurmálið, eisini teir sambandsmenn, sum royndu lutvíst at halda aftur í at geva loyvi til at brúka føroyskt mál, eitt nú Jógvan Poulsen og Fríðrikur Petersen.

Við bíbliu- og kirkjumálinum hevur føroyskt mál fingið nýgg, orð, og gomul gloymd orð eru tikin fram aftur og verða ikki bert brúkt í kirkjum og samkomum, men eisini annars millum manna. At hetta hevur ríkað mál okkara, kunnu ikki vera tvær meiningar um. At tað hevur gjørt móðurmálið reinari føroyskt, er heldur eingin ivi um. Eg minnist gomul fólk, sum talaðu á møtum og sum lósu úr danskari bíbliu. Mál teirra var ein ótrúligur vavstur av donskum og føroyskum. Tað er einki at ivast í, at tað er mangt og hvat at finnast at í málinum hjá teimum, sum prædika nú, men yvirhøvur man tað vera eitt hampiligt mál, og í hvussu so er, er prædikumálið hjá prestunum í stóran mun ávirkað av bíbliumálinum hjá Dahl.

Tað ber til – tað er gongdin í føroyskari málsøgu eitt prógv um – at benda eitt mál inn á ávísa leið. Men – tað mugu vit gera okkum greitt – vit koma ongantíð á mál. Vit vita, hvussu eymir eitt nú týskarar og fransar eru um síni mál, sum so nógv tala, og sum

eingin vandi er fyri í mun til okkara mál. Vit eru noydd til dagliga at hava við onnur mál at gera. Tað í sær sjálvum umframt nógv annað er ágangur á málið. Tað er ilt at skilja, at fólk, sum dagliga brúka málið, øsa seg upp um eitt nú nýggj orð, sum koma fram, annaðhvørt tey eru gjørd ella lænt. Sjálvsagt eru ikki øll orð líka heppin, men í roynd og veru er hvørt nýtt orð ein varði í málsøgu okkara. Enn minni er at skilja, hví hesin undarligi munurin skal gerast millum eitt nú eitt danskt orð og eitt íslendsk orð. Grundgevingin, at eingin sigur so ella so, heldur ikki. Sigur eingin hetta ella hatta nú, kann tað meira enn so henda, at øll fara at siga tað, tá ið ein tíð er frá liðin. Fyri nøkrum árum síðan høvdu vit bert orðið *helikoptari,* so fingu vit orðið *tyrla* afturat, sum er vorðið dagligt orð. Málið gjørdist ríkari av hesum orði, tí nú hava vit tvey í staðin fyri eitt orð.

Ískoyti

Seinni segði Conrad Joensen, at Victor Danielsen helt, tá ið kríggið var av, at føroyskt mál var so nógv broytt krígsárini – uttan ávirkan úr Danmark – at hann ikki vildi halda fram við málinum í 1937-týðingini av Nýggja Testamenti. Hann vildi ikki vera undan broytingini í málinum, men fylgja við henni.

Í bíbliu- og kirkjumáli okkara eru uttan iva orð í hundraðtali, sum eru vanlig nú, men sum vóru heilt ókend fyrst í hesi øldini. Í øllum livandi málum koma og fara orð. Hendir tað ikki í føroyskum, doyr málið.

Keldur

1. Den færøske sprogrejsning med særligt henblik på kampen om færøsk som kirkesprog i national og partipolitisk belysning. Í Hoydølum 1987. Funnist hevur verið at heitinum á bókini „Den færøske sprogrejsning" við teirri grundgeving, at hon ikki viðger alt málstríðið. Men við orðunum „med særligt henblik på" er setningurin avmarkaður til „kampen om færøsk som kirkesprog", og „kirkesprog" merkir sum í dagligari talu: málið í fólkakirkjuni. Og eg havi hugsað mær fleiri kanningar av málstríðnum. Mín er bert ein. Longu frammanundan var komin bókin hjá Arnfinni Thomassen um skúlamálið.
2. o. cit. s. 16.
3. Evangelium Sankta Matteusar, II. Um týðingina av bókini.
4. *Jógvan á Lakjuni:* Victor Danielsen. Ritgerðin er upprunaliga gjørd sum ársarbeiði á Læraraskúlanum 1976 og er seinni prentað í Dagblaðnum.
5. Eg fekk loyvi frá Sverra Dahl at lesa hetta. Nú er tað í varðveitslu á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum.
6. Hesi skjøl eru at finna í próstasavninum í Biskupsgarðinum í Havn, nú á Landsskjalasavninum, Keypmannahavnar biskupssavni á Landsarkivinum í Keypmannahavn og í savninum hjá kirkjumálaráðnum á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn.
7. *Chr. Matras:* Nøkur mentafólk, 1973, s. 15.
8. *M.A. Jacobsen:* J.P. Gregoriussen: Yrkingar, innganguri n s. VI. Fyrsta kapittul av Hásonginum er prentað í Færøsk Anthologi I, 1891, s. 286. Her standa bæði Hammershaimb og

J.P. Gregoriussen sum týðarar, men ikki er greitt, hvussu stóran lut, hvør av teimum eigur. Fyrra Pætursbræv er prentað í Føringatíðindum 1895 – 17/1, 21/2, 21/3, 2/5, 16/5, 18/7, 1/8.

9. Tingakrossur 1908 – 14. oktober.
10. *Joen Poulsen:* Bíbliusøga, 1900. Jógvan Poulsen nevnir í fortaluni, at tað var Hammershaimb, sum fyrst eggjaði honum til at fara undir bíbliusøguarbeiði, at Fríðrikur Petersen og Chr. L. Johannessen lærari hava givið sær „ráð og leiðbeiningar". Onnur fólk, sum hann takkar fyri hjálp, eru: A. Degn, R.C. Effersøe, Marie Mikkelsen og Chr. Bærentsen amtmaður.
11. The British Bible Society 1908.
12. Jógvan á Lakjuni s. 32.
13. Um Gulak Jacobsen sí Den Færøske sprogrejsning, serliga s. 276-78, 280, 284-91, 293 f.
14. Um Sørensen sí Den færøske sprogrejsning, serliga s. 257 og 287-92.
15. Um Emil Bruun sí navnaskránna í Den færøske sprogrejsning.
16. Skrivað 23. juni 1924. Brævið er í savninum hjá kirkjumálaráðnum á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn. journ. nr. 3Y2141.
17. Brævið er í próstasavninum í Biskupsgarðinum í Havn.
18. Sí Den færøske sprogrejsning s. 271-78.
19. Endurminningar, s. 11, nota.
20. Den færøske sprogrejsning, s. 271-78.
21. Sí millum annað bræv frá Gudmundi Bruun til Keypmannahavnar biskup dagfest ólavsøkudag 1919, Kirkeministeriets 1. kontor journ. nr. 3T963.

Petur Martin Rasmussen
Hvítanesvegi 9
FR-188 Hoyvík

Summary

There were two main schools of thought concerning the question of church language and what form it should take.

1. One school favoured a Danish-influenced language which was as close as possible to the spoken language of the time. Many people supported this view, among them the politician, Oliver Effersøe, and the parson, Th. Sørensen, but only Victor Danielsen translated accordingly. 2. The other school believed that the Faroese language should be cleansed of all non-Faroese elements, particularly Danish ones. Advocates of this view included Hammershaimb, Jógvan Poulsen and A.C. Evensen, but the chief proponent was Jákup Dahl, who gave Faroe Islanders the language of their church and bible.